# Tíggju spurningar um Sandoyartunnilin

**Annika Olsen, landsstýriskvinna í samferðslumálum, skal nú siga løgtinginum, hvørjar ætlanir samgongan hevur við Sandoyartunlinum**

SANDOYARTUNNIL
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

- Hvørjar ætlanir hevur sitandi samgonga viðvíkjandi komandi Sandoyartunlinum?

Hendan spurning hevur Páll á Reynatúgvi, sum hevur tikið sæti á tingi fyri Bertóru Høgnadóttir Joensen, sum er í farloyvi. Páll á Reynatúgvu er sum kunnugt borgarstjóri á Sandi og fyrrverandi tingmaður fyri oynna.

Nú hann hevur sæti á tingi vil hann fegin av Anniku Olsen, landsstýriskvinnu í samferðslumálum at svara tíggju spurningum viðvíkjandi tunlinum.

Hann spyr,

**1.** Hvørjar ætlanir hevur sitandi samgonga viðvíkjandi komandi Sandoyartunlinum?

**2.** Hvussu langt eru kanningarnar viðvíkjandi Sandoyartunlinum komnar, og hvat restar í?

**3.** Er linjuføringin fastløgd?

**4.** Hví varð verklagslógin um Sandoyartunnil tikin av?

**5.** Kunnu vit vanta eina nýggja verklagslóg um Sandoyartunnil, og nær?

**6.** Nær verður arbeiðið viðvíkjandi Sandoyartunlinum boðið út?

**7.** Nær byrjar arbeiðið upp á sjálvan Sandoyartunnilin?

**8.** Nær verður Sandoyartunnilin liðugur?

**9.** Hvussu verður Sandoyartunnilin fíggjaður, í byggitíðarskeiðnum og eftir at hann er liðugur?

**10.** Hvør verður rakstrar- og íløgukostnaðurin fyri farleiðina komandi hundrað árini, um vit sammeta sjóvegis farleiðina við Sandoyartunnilin?

- Tað er ikki at siga ov nógv, at undanfarna samgonga fekk sín mønusting av samlaðu handfaringini av spurninginum um Sandoyartunnilin. Undanfarni løgmaður førdi fleiri ferðir fram, at fullveldissamgongurnar samtyktu og settu í verk Vágatunnilin og Norðoyatunnilin, og at táverandi ABC-samgonga skuldi samtykkja Sandoyartunnilin, sum so skuldi liðugtgerast í hesum valskeiðnum, sigur Páll á Reynatúgvu.

Hann vísir á, at sitandi samgonga valdi at taka av verklagslógina, sum ásetti at tunnilsarbeiðið skuldi byrja í hesum ári.

- Tað er torført hjá vanliga fólkinum at skilja, hvat nú gongur fyri seg í samband við Sandoyartunnilin. Tað tykist rættiliga greitt, at verandi samgonga hevur raðfest aðrar tunnlar fremri, sigur hann.

Hann heldur, at samstundis sum tað er ómetaliga trupult at fáa eyga á nakran virksemisskapandi part fyri Sandoyar Sýslu í ólavsøkupakkanum, er tað eyðsýnt, at Sandoyingar ikki ynskja at vera hildnir fyri gjøldur av skiftandi politiskum valdi.

Páll á Reynatúgvu vísir á, at høvuðsargumentið fyri ikki at byrja Sandoyartunnilin í undanfarnu ABC-samgongu var, at búskapurin var ov heitur.

- Tað kann við vissu sigast, ikki at vera støðan í dagsins búskapi. Tíðin gongur, og sandoyingar eru av álvara farnir at seta spurnartekin við lyftini frá samgonguflokkunum um Sandoyartunnilin, sigur hann.

Fyri at gera gitingar og illgitingar til skammar við Páll á Reynatúgvu tí hava eina greiða útmelding frá landsstýriskvinnuni, samgongunnar vegna.

- Vit vita jú eisini, at júst dagfestingin fyri arbeiðsbyrjan, 1. novembur 2009, fekk avgerandi ávirkan á lagnuna hjá CHE-samgonguni. Ein dagfesting sum nú eftir øllum at døma ongan týdning hevur og hongur í leysum lofti, og sum ger framtíðarvánirnar ótryggar hjá unga ættarliðnum av sandoyingum, sum ynskja at seta búgv í oynni, sigur Páll á Reynatúgvu.



*Páll á Reynatúgvu nýti høvið, nú hann hevur sæti á tingi í nakrar dagar, at spyrja, hvørjar ætlanir landsstýrið hevur við Sandoyartunlinum*




**SUZUKI GR. VITARA 2.0 TD VØRUV.** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** SV 930 **Km:** 64.000
**Árgangur:** sep. 2003
**Útgjald:** 33.750 **Mðr. gjald:** 3.296 (3 ár)
**kr. 135.000,-**



**VW CADDY 1.9 TDI VØRUVOGN.** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** JK 915 **Km:** 108.000
**Árgangur:** 01.12.2004
**Útgjald:** 22.500 **Mðr. gjald:** 1.436 (5 ár)
**kr. 90.000,-**



**TOYOTA COROLLA 2.0 D-4D DIESEL** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** HA 241 **Km:** 63.000
**Árgangur:** 14.12.2004
**Útgjald:** 33.000 **Mðr. gjald:** 2.064 (5 ár)
**kr. 132.000,-**



**PEUGEOT 207 1.6 HDI DIESEL** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** MR 572 **Km:** 60.000
**Árgangur:** okt. 2006
**Útgjald:** 37.000 **Mðr. gjald:** 2.313 (5 ár)
**kr. 148.000,-**



**TOYOTA AVENSIS 2.0 SOL AUT** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** DJ 672 **Km:** 24.000
**Árgangur:** jul. 2005
**Útgjald:** 46.250 **Mðr. gjald:** 2.868 (5 ár)
**kr. 185.000,-**



**TOYOTA AVENSIS 1.8 STC. SOL** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** LM 312 **Km:** 71.000
**Árgangur:** mars 2004
**Útgjald:** 38.750 **Mðr. gjald:** 3.755 (3 ár)
**kr. 155.000,-**



**TOYOTA AURIS 1.6 M/M LUNA** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** UG 268 **Km:** 35.000
**Árgangur:** juli 2007
**Útgjald:** 47.000 **Mðr. gjald:** 2.931 (5 ár)
**kr. 188.000,-**



**TOYOTA RAV4 2.0 D-4D DIESEL** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** VS 984 **Km:** 135.000
**Árgangur:** apríl 2002
**Útgjald:** 34.500 **Mðr. gjald:** 3.356 (3 ár)
**kr. 138.000,-**



**NISSAN KING CAB 2.5 DIESEL** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** LU 544 **Km:** 40.000
**Árgangur:** nov. 2006
**Útgjald:** 54.000 **Mðr. gjald:** 3.333 (5 ár)
**kr. 215.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1.6 TERRA SEDAN** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** PG 732 **Km:** 93.000
**Árgangur:** des. 2003
**Útgjald:** 27.500 **Mðr. gjald:** 2.692 (3 ár)
**kr. 110.000,-**

6 mánaða garanti

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipan, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, ið eyðsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
**Kom og vitja okkum – landsins fremstu bilasølu.**

Brúktir bilar við **lagaligari fígging**

**REYNI SERVICE** P/F
Vegurin Langi · Hoyvík · Tel 353040 · Fax 353041
Við Borðoyavík · Klaksvík · Tel 473040 · Fax 473041
T-postur: rs@reyniservice.fo · www.reyniservice.fo